Aksel V. Johannesen
Páll á Reynatúgvu
Bjarni K. Petersen
Bjørt Samuelsen
Ingilín D. Strøm
Hervør Pálsdóttir
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 66/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum (Lækka virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni, rokna skrásetingargjaldið á innfluttum brúktum motorakførum við støði í keypsprísinum, frítaka flytigóðsmotorakfør frá skrásetingargjaldi, stytta tíðarskeiðið fyri undantøku av virðisavgjaldi hjá hýru- ella skúlavognum og leingja undantøkuna fyri at rinda virðisavgjald fyri motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í frágreiðandi heitinum verða orðini "persónbilar við hybrid tøkni og" strikað.

2. Í § 1, nr. 2 verður § 3, stk. 2 orðað soleiðis:
   "Stk. 2. Persónbilar við plugin-hybrid tøkni, sum verða skrásettir frá 1. januar 2021, skulu rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr. og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr."

3. § 2 verður orðað soleiðis:
   "**§ 2**

   Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2021."

Viðmerkingar

Mælt verður frá at geva avgjaldslætta á hybridbilar, tí hetta fer at seinka gongdini at gerast leys av lívrunnum brennievni og er sostatt eitt fet skeiva vegin á grønu kósini. Í dag er lítil og eingin munur á útlátinum frá einum vanligum hybridbili og teimum nýggjastu bilunum við bensin- ella dieselmotorum. Tað er tí ein misskiljing, at vanligir hybridbilar verða roknaðir sum serliga umhvørvisvinarligir bilar í hesum uppskotinum, tí tað eru teir ikki.

Lækkingin av virðisavgjaldinum á hybridbilar verður við broyting nr. 2 tikin úr uppskotinum. Broyting nr. 3 er einans av lógartøkniligum slag og broytir ikki innihaldið.

Á Løgtingi, 18. februar 2021

Aksel V. Johannesen	Páll á Reynatúgvu	Bjarni K. Petersen
Bjørt Samuelsen	Ingilín D. Strøm	Hervør Pálsdóttir